# Hann leggur inn lendi

*Eyðansstovubóndin í Sandavági er farin undir eina stórfingna búnaðarætlan. Hann veltir upp úr nýggjum og miðar ímóti at handla við bæði kríatúrum og fóðri*



*Jákup Pauli í Eyðansstovu sigur, at í hansara føri hevði tað borið væl til at gjørt meira við seyðahaldið. Og tað ætlar hann sær eisini at gera*

EDVARD JOENSEN

Fleiri enn seksti halar í fjósinum. Ivaleyst av grasi bæði til egna nýtslu og til sølu. Og handil við ungneytum. Hetta er tann stóri setningurin, hin 29 ára gamli Eyðansstovubóndin í Sandavági er farin undir.

Beint innanvert skúlan á Giljanesi er fjósið hjá Eyðansstovubóndanum, og har standa eisini sethúsini, har vit hitta Jákup Paula í Eyðansstovu.

Hann er júst komin aftur av búnaðarstevnu á Hotel Vágum, har hann hevur hitt aðrar føroyskar bøndur, sum hava lurtað eftir norska búnaðar- og búskaparfrøðinginum, Ole Christen Hallesby, ið hevur tosað um tað at vera bóndi.

Tað sær eitt sindur rokut út uttan fyri hjá Eyðansstovubóndanum. Klædningurin er tikin av endanum á fjósinum. Ein nýggj fjósgrund er í gerð, og í túninum liggja bunti av armeringsneti, sum siga frá, at her skal meira byggjast.

Jákup Pauli í Eyðansstovu greiðir frá, at hann í dag hevur 14 mjólkineyt, og at hann eftir útbyggingina ætlar at hava 22. Men tann stóra skipanin í fjósinum, ætlar hann, skal vera ungneyt. 40 ungneyt aftrat mjólkikúnum ætlar hann at hava, tá fullskipað er, sigur hann.

Ætlan hansara við ungneytunum er, at hann fer at seta kvígur við og so selja tær víðari til aðrar bøndur í landinum, tá tær eru kvidnar. Jákup Pauli sigur, at hann eisini hugsar um at keypa kvígukálvar til at selja víðari, um hann ikki fær nóg nógvar úr egnum fjósi.

Tarvskálvarnar fer hann at lata út í Mykines, har møguleikarnir ikki eru til mjólkarframleiðslu, men hinvegin til kjøt.

Jákup Pauli í Eyðansstovu heldur tað ikki vera rætt, at vit skulu flyta inn 80% av tí kjøti, vit eta. Hann sær avgjørt møguleikar í at hava kjøtneyt í Føroyum.

### Nýlendi

Jákup Pauli í Eyðansstovu hevur velt upp úr nýggjum í Vágadali oman fyri Sandavág. Hann hevur hálvatriðju mørk við haga, sum er rættiliga góður at velta, sigur hann. Fyri nøkrum árum síðan fekk hann eina útskifting, soleiðis at hann nú hevur einbýttan haga.

Jákup Pauli sigur, at hann hevur velt eini 24 kúfóður úr nýggjum og ætlar at velta 16 aftrat. Alt í alt væntar hann, at velti bøurin um nøkur ár fer at geva so mikið, at hann kann selja stráfóður, sum annars nakað væl verður innflutt av. Her nevnir hann millum annað rossafólkið, sum keypir nógv útlendskt hoyggj. Og hann ivast ikki í, at tað fer at bera til at fáa so mikið av grasi, at hann kann selja. Hetta skuldi, saman við handli við kvidnum kvígum, kunnað givið eitt gott íkast til raksturin, metir hann.

Og júst her eru vit inni á onkrum av tí, norðmaðurin Ole Christen Hallesby tosaði um á stevnuni á Hotel Vágum. Nevniliga at hugsa øðrvísi og nýtt innan føroyskan landbúnað.

### Møguleikar í seyðinum

Eyðansstovuhagin hevur høgligan undirhaga, sum væl ber til at velta heilt niðan undir fjallið, sigur Jákup Pauli. Og hann hevur gjørt fitt av uppdyrkingarvegi gjøgnum hagan. Hesin vegur verður millum annað nýttur til taðing um summarið.

Jákup Pauli í Eyðansstovu heldur, at tað er rætt at satsa upp á seyðahald í Føroyum. Mjólkin er kvoterað, so har gerst ikki meira við útbygging. Men seyðurin eigur avgjørt møguleikar í sær, heldur Eyðansstovubóndin.

Her hugsar hann um kjøtframleiðslu, sigur hann. Tí støðan hjá tí, sum uttan á seyðinum er, sær heldur ullint út í løtuni.

Føroyski marknaðurin er eingin forðing, hóast vit ofta hoyra, at hann er so lítil. Jákup Pauli í Eyðansstovu heldur ikki, at tað verður nakar trupulleiki at slepp av við føroyskt kjøt. Tað er stutt sagt ikki annað kjøt, sum kann turkast, heldur hann.

Hann heldur, at rætt hevði verið at minkað áseyðatalið og lagt seg eftir at fingið tvílembur. Tað hevði helst gjørt, at tað varð betri lambað. Vóru færri ær til somu fóðurnøgd og lendi, er helst eingin ivi um, at lombini gjørdust bæði fleiri og betri.

Jákup Pauli í Eyðansstovu sigur, at í hansara føri hevði tað borið væl til at gjørt meira við seyðahaldið. Og tað ætlar hann sær eisini at gera.

»Tað er skilagott at hava fleiri bein at standa á«, heldur hann.

Nú hevur hann góðan møguleika at koma gjøgnum hagan eftir vegnum, hann hevur gjørt. Hann sigur, at hann fær sprænt eini 1000 tons av tøðum út í hagan, og tað má kunna síggjast aftur á seyðinum.

Sjálvandi sleppur hann ikki um allan hagan við tøðvogninum. Men har, ikki er atkomandi við vogninum, ætlar hann at taða við kunsttøðum, sigur Eyðansstovubóndin.

Síðan er tað tann nýggi bøurin, sum verður sligin. Har hevur hann ætlanir um at sleppa til dømis tvílembu- og gimbralombum inn á eftirgróðurin seinnapart á sumri. Tað gevur aftur ónum møguleika at koma betri fyri seg aftur, tá lombini verða tikin frá teimum, vísir Jákup Pauli í Eyðansstovu á.

### Vit klára tað nokk

Jákup Pauli í Eyðansstovu er ikki bangin fyri, at føroyski landbúnaðurin skal brenna inni við síni vøru.

Matvørur er ein stórur partur av lívinum hjá fólki. Tað er nakað, vit skulu hava hvønn dag, so har er einki at vera bangin fyri, sigur hann. Og tað ger ikki tað sama, hvat vit eta. Tað ber ikki til bara at stappa okkurt lort niður í búkin á fólki. Vit skulu hava ordiligan kost fyri at liva ordiliga, sigur Eyðansstovubóndin.

Jákup Pauli vísir á, at vit hoyra dagliga um bæði líkt og ólíkt, sum funnið verður í útlendskum matvørum. So eru tað bakteriur og basillur ein dag. Dagin eftir eru tað kemisk evni og so framvegis.

Halda vit okkum til føroyskt seyðakjøt, eru hesir trupuleikarnir ikki til staðar, sigur hann.

Jákup Pauli í Eyðansstovu tók við garðinum eftir pápa sín fyri seks árum síðan. Hann hevur verið tvey ár á landbúnaðarskúla í Kollafirði og kann sita við festinum í eini 40 ár aftrat.

Vit fara inn á skrivstovuna. Har er eingin telda, vísir hann á. Hana dugir hann ikki at tendra kortini, sigur hann. Men roknskapi og tí, sum har hongur uppi við, ber hann ongan ótta fyri kortini. Tað hevur hann ein sera góðan grannskoðara at taka sær av.

Á borðinum liggur ein tekning av nýggja fjósinum, sum hann vísir okkum.

Neytini fara at standa í tveimum røðum við reyv móti reyv. So slepst undan at dálka veggirnar, heldur Jákup Pauli. Og til ungneytini eru teknaðar krubbur, har fimm og seks skulu ganga í hvørjari.

Innrættingin verður nútímans, so einki, ella sum minst, skal lyftast og berast. Mjólkimaskinur, fóðurautomatir og hvat nú verða kann, skal alt flytast mekaniskt.

Talan er um eina milliónaíløgu. Men hana ræðist bóndin ikki.

»Tú skalt trúgva upp á tað og so bara fara til verka«, sigur Jákup Pauli í Eyðansstovu, bóndi í Sandavági.





# Heri nýggjur stjóri á Ferðaráðnum

*Heri Niclasen, sølu - og marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways, varð í gjár settur í starv, sum nýggjur stjóri á Ferðaráð Føroya. Heri hevur drúgvar royndir innan føroyska ferðavinnu og hann gleðir seg til at smoyggja upp ermar og fara í holt við nýggju avbjóðingina*

SVEINUR TRÓNDARSON

Ferðaráð Føroya fekk nýggjan stjóra í gjár. Landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum, Finnbogi Arge, gjørdi av at fylgja tilmælinum frá stýrinum fyri Ferðaráð Føroya og seta tann 54 ára gamla Hera Niclasen í starv, sum stjóri á Ferðaráð Føroya.

### Ein spennandi avbjóðing

Sjálvur fegnast Heri Niclasen um, at hann hann fekk starvið.

– Eg havi starvast í ferðavinnuni í sekstan ár og eg haldi, at tað var ein náttúrligur partur av eini starvsleið innan ferðavinnuna, at eg søkti hetta starvið og eg haldi ikki, at tað er verri fyri Ferðaráði Føroya, at tað fær ein stjóra, sum kemur úr sjálvari vinnuni. Á tann hátt kann Ferðaráðið fáa tilført eina nýggja dimemsión, sigur nýsetti stjórin, tá vit fingu orð á hann seinnapartin í gjár.

Hann veit, at avbjóðingin er stór, men hann stúrir ikki fyri at fara undir hana.

Hann veit hvat hon inniber, og hann veit kanska betri enn nakar innan føroysku ferðavinnuna, hvat skal til, fyri at fáa føroysku ferðavinnuna at virka sum eina heild.

– Hetta fer at seta sera stór krøv til samstarvsevnini, tí vit skulu samstarva við so nógv fólk, feløg og stovnar, sum eru í vinnuni, sigur nýggi stjórin, sum sær tað sum sítt fremsta mál, at fáa samstarvið í vinnuni at koyra.

– Tað eru jú so nógvir leikarar á pallinum og gera arbeiða teir ikki saman, so kann tað ávirka teirra úrslit. Tað at teir ikki arbeiða saman merkir ikki, at teir mótarbeiða hvør øðrum, men samstarv millum aktørarnar í vinnuni og ein samansjóðing av tí, teir hava at bjóða fram, verður nakað av tí, sum eg fari at arbeiða við, sigur Heri Niclasen.

### »Góðkenning«

Hóast Heri ikki fílist á góðskuna á tí, sum føroyska ferðavinnan hevst at, so heldur hann at eitt slíkt samstarv millum Ferðaráðið og teir, sum eru í vinnuni, kundi havt ymsar ágóðar við sær fyri vinnuna.

– Landið er so lítið, og fer hvør fjørður at bjóða út tað sama uttan at tað verður samansjóða, so er vandi fyri, at alt gerst ein vavgreytur. Økisfeløgini gera eitt ótrúliga stórt arbeiði, men hjá teimum, sum gera príslistarnar er tað torført at vita hvussu gósðkan er á teimum ymsu tiltøkunum. Tað kann ein samansjóðing bøta uppá. Hon kann virka sum ein »góðkenningarskipan«, sum gevur teimum, sum gera príslistarnar nakað at arbeiða út frá, sigur Heri og leggur dent á, at tað ikki er tí, at góðskan er vánalig.

### Fatur á pengasterkum ferðandi

Nýggi stjórin á Ferðaráðnum dylir ikki fyri, at vit eiga at leggja okkum eftir at fáa peningasterkar gestir til Føroya.

Hann greiðir frá, at Atlantsflog í seinastuni hevur arbeitt við at uppbyggja eitt agentnet úti í Evropa saman við SAS og Icelandair og tankin aftanfyri tað er, at fáa so stóra flatu úteftir, sum gjørligt.



*Heri Niclasen, stjóri saman við Petur Olivar í Hoyvík, stýrisformanni og Arna Poulsen, vinnumálastjóra*

– Tað er ikki at leggja seg eftir einum ávísum málbólki, men eg haldi, at vit eiga at royna at fáa peningasterkar gestir til Føroya.

Sum støðan er í løtuni, so er ferðavinnutíðin í Føroyum ikki serliga long, og tað heldur Heri, at vit eiga at gera nakað við.

– Vit eiga at leingja um ferðavinnutíðina í byrjanini og í endanum fyri at fáa fleiri ferðandi til Føroya, tí tað er ein spurningur um vit klára at hýsa fleiri í háárstíðini, sum tað sær út nú. Og tað má vera ein samanhangur ímillum útboði og kapasitetin, sigur hann.

Hann vísir eisini á møguleikan at lýsa Føroyar sum skeiðstað og líknandi, tí tað er ofta nakað, sum hendir uttanfyri vanligu ferðavinnutíðina.

### Broyta hugsunarhátt

Tá kemst ikki uttanum, at Heri Niclasen er ein sera kendur maður, tá tað um ferðavinnu ræður. Hann hevur starvast á SmyrilLine í 12 ár og á Atlantsflog í hálvt fjórða, og hevur í báðum støðum tikist við søluog marknaðarføring. Tí kennir hann og er kendur av einum ótali av fólki bæði innanlands sum uttanlands.

Og Heri veit, at tað kann gerast ein fyrimunur hjá honum nú hann fer í nýggja starvið.

– Tað eigur sjálvsagt at vera ein fyrimunur, at hava arbeitt saman við so nógvum fólki. Tað verða so at siga somu fólk, sum eg komi at samstarva við í nýggja starvinum. Bæði innanlands og uttanlands.

Men nýggja starvið krevur eisini, at hann sjálvur broytir hugsunarhátt. Fyrr hevur høvuðsendamálið verið eksternt, sum hann sjálvur tekur til, men nú verður tað internt.

Men tí smæðist hann ikki fyri, og hann gleðir seg ógvuliga nógv at fara undir nýggju uppgávuna, sum liggur fyri framman.

Heri heldur fram í starvinum hjá Atlantsflog í tríggjar vikur afturat. Hesa tíðina skal hann brúka til at handa øðrum tað, sum hann hevur tikist við, og so er klárt at taka við nýggja starvinum.

Starvið er áramálssett fyri fimm ár, men Heri vónar, at hann klárar at gera eitt so gott arbeiði, at starvstíðin verður longd.

Sosialurin ynskir nýggja stjóranum á Ferðaráð Føroya tillukku og góðan byr frameftir.

## Fakta um

## Heri Niclasen

Føddur á Tvøroyri 1946, 54 ára gamal

Útbúgvin sum fjarrirtari í Keypmannahavn

Størv: Fjarritari í Grønlandi frá 1966 til 1975
Fjarritari á Lyngvy Radio 1975 til 1984
Fjarritari við Norrønu 1984

Starv á marknaðardeildini hjá Smyril Line 1984 til 1986
Sølu- og marknaðarleiðari hjá Smyril Line 1986 til 1996
Sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways 1996 til 2000
Stjóri á Ferðaráð Føroya frá 1. apríl 2000

# Oceanic Days á pall

*Trý ár seinni enn ætlað verður symfoniin, Oceanic Days, hjá Sunnleifi Rasmussen frumfranførd. Tað er Sinfóniuhjómsveit Íslands, sum hevur fingið heiðurin at vera fyrsta orkestrið, sum sleppur at spæla fyrstu føroysku symfoniina nakrantíð*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fríggjakvøldið 31. marts verður stórur dagur í føroyskari tónleikasøgu. Tá verður symfoniin »Oceanic Day« hjá Sunnleifi Rasmussen frumframførd í Norðurlandahúsinum.

Tað er ikki hissini verk, sum verður framført henda dagin, tí ikki færri enn 85 tónleikarar koma úr Reykjavík og teir hava so nógv ljóðføri við sær, at eitt flogfar burturav má nýtast til flutningin.

Í gjár skipaði Norðurlandahúsið fyri tíðindafundi í sambandi við konsertina.

### Tungur burður

Tað var nú ikki ætlanin, at verkið hjá Sunnleifi skuldi framførast nú, tí í avtaluni, sum táverandi stjórin Peter Turtschaninoff gjørdi við tónasmiðin, var avrátt, at verkið skuldi á pall eitt ár eftir at Sunnleif var liðugur við tað.

Men umstøðurnar vildu tað so, at tað bar ikki til.

Upprunaliga ætlanin var, at finska symfoniorkestrið skuldi frumframføra verkið, men ætlanir teirra og ætlanirnar hjá leiðsluni í Norðurlandahúsinum passaðu ongantíð saman.

Norðurlandahúsið vildi, sum skilligt er, hava verkið frumframført í Føroyum, meðan finnar buðu sær til at frumframføra tað í Onglandi og so koma til Føroya á vegnum, men soleiðis varð ikki, og tí varð alt av ongum í fyrsta umfari.

Í sambandi við stjóraskifti í Norðurlandahúsinum er eyguni so vend vesturyvir til grannarnar í Íslandi og nú bar til.

Sinfóníuhjómsveit Íslands tók av og 31. marts upprennur so tann stóri dagurin, tá verkið fyrstu ferð verður framført.

### Stór verkætlan

Sum tað sæst omanfyri, so er tað ikki eiti á verkætlan, sum Norðurlandahúsið hevur sett saman hesaferð.

Helga Hjørvar greiðir frá, at alt varð lættari av, at Reykjavík er valdur, sum Mentabýur 2000 og at teir samstundis vildu geva føroyingum ein part av tí eisini.

– Verkætlanin er ógvuliga dýr, men av tí, at tað her er talan er um eitt fast orkestur, sum tekur verkið upp, so sleppa vit undan lønum til leikararnar og tryggingum í sambandi við flutningin og tað er nógv at spara, greiðir Helga Hjørvar frá.

Samanlagt kostar verkætlanin góðar 800 túsund krónur og hóast tað ljóðar av nógvum, so er tað bara umleið helmingurin av tí, sum tann fyrsta verkætlanin var mett at kosta.

– Tað er m. a. av tí, at vit sleppa undan lønum og tryggingum, men tað hevur sjálvandi eisini nógv at siga, at tónleikararnir »bara« skulu ferðast úr Íslandi, leggur hon afturat.

### Stuttur steðgur

Tað er ikki bara sum at siga tað at fáa eitt symfoniorkestur til Føroya, tí tey hava ofta nógv um at vera. Soleiðis er eisini við íslendska orkestrinum, og tí verður talan um ein sera stuttan steðg.

Orkestrið kemur til Føroya hósmorgunin 30. mars og fer avstað aftur til Íslands leygarkvøldið 1. apríl.

Mánadagin skal orkestrið nevniliga undir nýggjar venjingar av einum øðrum verkið, so stundir eru ikki til ein drúgvari steðg.

Kortini eru møguleikar fyri at tað vera tvær konsertir á Føroyaferðini, hóast tað enn bert er tann eina, sum er sett í skránna.

Tann konsertin er sett at verða fríggjakvøldið 31. mars klokkan 19.30, men verður útselt til ta konsertina, so er ikki óhugsandi, at ein konsert verður seinnapartin leygardagin, beint áðrenn íslendsku tónleikararnir fara avstað aftur.

### Atgongumerki til keyps um alt landið

Fyri at fólk í øllum landinum skulu hava møguleika at ogna sær eitt atgongumerki, verða tey seld í sølubúðum ymsastaðni kring landið.

Tangabúðin á Tvøroyri, Kiosk Vár í Runavík, Statoilstøðin í Klaksvík, Statoilstøðin á Sandi og Myllan í Miðvági selja atgongumerki til konsertina, men tað ræður um at verða knappur, tí einans 550 fólk sleppa til hvørja konsert.

Kostnaðurin fyri atgongumerki er 150 krónur.